# Føroyskur landabásur á Seafood Expo Global

# Kravfesting

## 0. Samandráttur

Føroya Arbeiðsgevarafelag biður um tilboð uppá sniðgeving, uppseting og niðurtøku av føroyskum landabási á Seafood Expo Global (SEG) í Brussel, umframt aðrar tænastur í hesum sambandi.

Talan er um alment útboð.

## 1. Skjøl:

Fyri útboðið er henda skjalaraðfylgja galdandi:

a. Design Specifications & Exhibit Height Restrictions
b. Yvirlitsplanur yvir høll 5
c. Tilboðið
d. Henda kravfesting
e. Exhibitor action checklist

Um ósamsvar er millum hesi skjøl, galda ásetingar í ovaru skjølunum fram um ásetingar í niðara nevndu skjølum.

## 2. Vegleiðandi tíðarætlan:

17-08-2016: Kunnandi fundur, har áhugaðir tilboðsgevarar fáa høvi at seta spurningar.

31-08-2016: Síðsta freist at lata tilboð inn til Føroya Arbeiðsgevarafelag

15-09-2016: Vinnarin av tilboðnum verður kunngjørdur.

01-11-2016: Yvirlitsplanur sendast sendast Føroya Arbeiðsgevarafelag til góðkenningar.

06-01-2016: Nágreinilig lýsing av sniðgeving sendast Føroya Arbeiðsgevarafelag til góðkenningar.

01-02-2014: Nágreinilig lýsing av sniðgeving sendast SEG til góðkenning.

## 3. Grundleggjandi krøv

Føroyski landabásurin skal setast upp á básplássi 5-129 í Høll 5 í Brussel Exhibition Centre (sí yvirlitsplan yvir høll 5 í skjali b).

Básplássið er 8x32 fermetrar, í alt 256 fermetrar.

Landabásurin skal til eina og hvørja tíð lúka tey krøv og ásetingar, sum verða settar av fyriskiparunum á SEG.

## 4. Veitingar

**Básurin:**

*Yvirlitsplanur*

Uppgávan fevnir um at gera ein yvirlitsplan yvir básin, har tað sæst hvussu skilaveggirnir verða settir upp, og har tað er tilskilað hvørji øki, hvør einstøk fyritøka ræður yvir, og hvørji øki verða nýtt sum felagsøki.

Á sumri á hvørjum árið kunnu fyritøkurnar seta fram ynski um hvussu nógvar fermetrar tær ynskja á messuni komandi ár. Føroya Arbeiðsgevarafelag tillagar síðani ynskini, so samlaða fermetratalið hóskar til básstøddina. Yvirlitsplanurin kann tí broytast nakað frá ári til ár, og er tað uppgávan hjá veitaranum at gera nýggjan yvirlitsplan, um fermetratalið hjá einstøku fyritøkunum broytist.

Veitarin fær í seinasta lagi 1. oktober (í 2016 so skjótt sáttmáli er gjørdur við veitaran) eitt yvirlit frá Føroya Arbeiðsgevarafelag yvir luttakandi fyritøkurnar, og hvussu nógvar fermetrar hvør einstøk fyritøka hevur fingið tillutað. Út frá hesum og eftir at hava innheintað nærri ynski frá fyritøkunum, skal veitarin gera eitt uppskot til yvirlitplan, sum skal sendast Vinnuhúsinum til góðkenningar innan 1. November 2016. Um Føroya Arbeiðsgevarafelag

ynskir broytingar, verða hesar sendar veitaranum skjótast gjørligt, og skal veitarin tillaga yvirlitsplanin eftir hesum.

Tíðarfreistin fyri at senda inn sniðgeving av bási til SEG er 1. februar 2016, og tí má uppskot til sniðgeving av básinum verða sent Føroya Arbeiðsgevarafelag til góðkenningar í seinasta lagi 6. januar 2016. Sí annars hjálagda skjal fyri vegleiðandi tíðarætlan.

*Krøv til tilfar og grafiskan samleika.*
Básurin skal byggjast upp við gólvi/teppi, skilaveggum og skelting, sum fortelur teimum vitjandi, at talan er um føroyska landabásin. Básurin skal hava eina grafiska heild.

Gólvið: Av tí at betongólvið í høllini kann vera óslætt, er ynski um at byggja upp eitt plant gólv. Ynski er at fáa tveir prísir uppá gólv. Eitt við teppi og eitt uttan (bert gólv). Í tilboðnum skal upplýsast, um tjúkd og tilfar av teppinum og gólvinum.

Ljós: Tað er umráðandi at hava góð ljósviðurskifti á básinum. Ljós skal eisini lýsa á veggirnar, so at tilfar o.a., ið hongur á veggjunum, er sjónligt. Harumframt kann ljós verða nýtt til at lýsa upp aðra skelting.

Skilaveggir: Veggirnir skulu verða úr so mikið góðum tilfari, at teir vera standandi, hóast nógv fólk og virksemi er á økinum. Veggirnir á básinum skulu vera í neutralum liti, s.s. hvítt. Liturin á veggum og gólvinum/teppinum skal ikki órógva heildarupplivingina av teimum einstøku básunum á landabásinum. Í tilboðnum skal upplýsast um tjúkd og tilfar av veggunum.

*Skelting v.m.*

Tann føroyski landabásurin skal hava skelting ella líknandi, sum greitt vísir, at talan er um føroyska landabásin. Orðini “Faroe Islands” skulu síggjast týðiliga, og tað skal bæði langt frá og tá tú stendur nær við landabásin vera sjónligt, at talan er um føroyska landabásin.- Skeltingin skal annars passa inn í heildina av básinum.

Veitarin hevur ábyrgdina av at heingja skelti upp eftir teimum reglum ið eru galdandi. Tað merkir eisini, at veitari má kanna umstøðurnar fyri at heingja skelti upp á SEG.

**Uppseting og niðurtøka av bási**:

Uppgávan fevnir um uppseting av bási sambært sniðgevingini og um niðurtøku av básinum. Um neyðugt skal veitarin eisini syrgja fyri, at ábøtur verða gjørdar á básin, meðan messan er, so góðskan á básinum verður varðveitt funktionelt og estetisk.

Veitarin sleppur inn á økið tá fyriskiparin av SEG loyvir tí (sambært galdandi reglum hjá SEG), og básurin skal verða klárur til nýtslu seinast 2 tímar áðrenn messan letur upp fyri gestum. Niðurtøkan av básinum kann byrja, tá luttakandi fyritøkurnar hava tikið sítt tilfar niður. Hetta skal gerast skjótast gjørligt aftaná messuna, tó í seinasta lagi sambært reglum hjá SEG.

Um tilfar til gerð av básinum skal goymast, er hetta eisini uppgávan hjá veitaranum.

**Avmarkingar:**

Uppgávan fevnir ikki um ráðgeving ella sniðgeving í mun til luttakandi fyritøkurnar á teimum ymisku básunum. Heldur ikki um flutning ella goymslu av tilfari, sum framsýnarar sjálvir framleiða.

Um fyritøkur hava serlig ynski, eitt nú um loft í fundarhølum ella serliga útgerð, skulu fyritøkurnar fakturerast serstakt fyri hetta.

**Innbúgv (samskifti við fyritøkurnar):**

Veitarin skal tryggja, at neyðuga innbúgvið er til staðar á teimum einstøku básunum so sum stólar, borð o.s.fr. Hetta má samskipast við fyritøkurnar, og fyritøkurnar gjalda kostnaðin av leigu av innbúgvi v.m. Fyritøkurnar skulu fakturerast beinleiðis av veitaranum, og er hetta Føroya Arbeiðsgevarafelag óviðkomandi.

**Veitingar til básin:**

Hvør básur skal hava atgongd til streym og internetsamband við hóskandi ferð í mun til talið á luttakandi fyritøkum. Í tilboðnum skal kapasiteturin verða upplýstur.

Køkurin skal hava rennandi vatn og frárensl og skal annars fylgja teimum forskriftum, sum SEG ger. Veitarin skal eisini syrgja fyri reingerð av básinum, meðan messan er, og skal fáa til vega og servera kaffi, the, vatn og juice. Roknast má við, at tørvur er á tveimum starvsfólkum til hetta arbeiðið.

Veitingin fevnir eisini um goymslu og flutningi av øllum tilfari, ymiskar installatiónir, íbindingar í messuhøllini, burturbeining av skrelli og annað sum kemur afturat í samband við uppseting og niðurtøku av básinum. Kostnaðurin av hesum er broytiligur frá ár til ár, og skal tí víðarifakturerast serskilt uttan eyka overhead. Søguliga hevur kostnaðurin av hesum verið uml. kr. 100.000,00.

**Tillutanarkrøv:**

Tá mett verður um tilboðini verður dentur lagdur á (í hesari raðfylgju):

1. Kostnað
2. Góðsku av tilfari.
3. Heildarmeting av veitara og týðandi undirveitarum.
4. Heildarmeting av sniðgevingini

**Statusfundir og eftirmeting**

Veitarin skal luttaka í statusfundum, har gongdin í verkætlanini verður viðgjørd.

Veitarin skal eisini á hvørjum ári luttaka í einari eftirmeting av messuluttøkuni.

**Krøv til tilboðið:**

Saman við tilboðnum skal vera ein stutt lýsing av fyritøkuni og týðandi undirveitarum, sum fyritøkan fer at nýta. Harumframt eina lýsing av royndum at fyriskipa líknandi messuluttøku ella tiltøk.

Tilboðið skal verða útgreinað við einum tilboðslista, har tað er sjónligt, hvør kostnaðurin er fyri hvørja einstaka veiting.

Tilboðið skal innihalda eina skitsu av, hvussu tilboðsgevarin ímyndar sær grafiska samleikan á básinum.

Eisini skal greiðast frá tilfari av veggum og gólvi á básinum (serliga tjúkd og tilfar).

Vit ynskja eitt tilboð uppá veitingin fyri eina messuluttøku (fyri 2017), og eitt tilboð fyri 3 ára messuluttøku (2017-2019). Tó er sannlíkt, at tikið verður av tilboðinum uppá eitt ár (2017). Um so er at sáttmáli verður gjørdur fyri eitt ár, verður optión uppá leinging av sáttmálanum í upp til 2 ár afturat, í tann mun at bæði útbjóðari og tilboðsgevari semjast um tað.

Tænastur sum verða gjørdar í Føroyum skulu fakturerast við MVG. Tænstur sum verða gjørdar uttan fyri Føroyar skulu ikki fakturerast við MVG, tí tá er talan um veiting í útheiminum. Veitarin skal hava í huga, at útlendskir undirveitarar kunnu fakturera við útlendskum MVG, og henda rokning skal ikki sendast víðari til Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tilskilar sær rætt til at velja frítt millum innkomnu tilboðini ella ikki at taka av nøkrum tilboði.

## Spurningar og svar

Kunnandi fundur verður hildin í Vinnuhúsinum, Óðinshædd 7, 17. august 2016, har áhugaðir tilboðsgevarar kunnu spyrja og fáa svar.

Tað ber eisini til at senda inn skrivligar spurningar. Bæði spurningar og svar verða lagdir út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

## Innlating av tilboði

Tilboðið kann sendast við brævi til Vinnuhúsið, Óðinshædd 7, 100 Tórshavn ella við telduposti til industry@industry.fo. Tilboðið skal vera Vinnuhúsinum í hendi í seinasta lagi mikudagin 31. august kl. 12.00. Miðað verður eftir at gera sáttmála við veitara sum skjótast eftir hetta.